# Leys størv í Tórshavnar kommunu

www.torshavn.fo

## BYGGIFRØÐINGUR

**Tórshavnar kommuna søkir eftir byggifrøðingi til býarskipanardeildina at byrja skjótast tilber. Talan er um fulltíðarstarv.**

Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu hevur ábyrgdina av at menna og seta í verk ætlanir við byggivirksemi, bæði fyri einstaklingar, stovnar og vinnulívið.

Býarskipanardeildin er ein partur av teknisku fyrisitingini hjá kommununi og deildin húsast í posthúsbygninginum á Vaglinum. Arbeiðið er grundað á virðini: Virðing, menning og trivnaður.

Sum starvsfólk á Býarskipanardeildini hjá Tórshavnar kommunu fært tú millum annað ábyrgd av:

- at arbeiða við býarskipan
- at arbeiða við ætlanum fyri útstykking og ger av byggisamtyktum
- at gera útbjóðingartilfar
- at fyrireika byggiskráir
- at fyrireika mál sum skulu fyri nevnd
- tvørfakligum sektorsamstarvi,
- eftirliti og byggiroknskapi
- uttanhýsis samskifti við ráðgevarar

**VIT VÆNTA AV TÆR, AT TÚ:**

- hevur viðkomandi útbúgving og royndir innan planlegging, býarskipan og umsiting
- hevur góðan telduførleika og royndir innan AudoCad , Microstation og Indesign
- hevur góð samskiftisevni
- góðan kunnleika í føroyskum, norðurlendskum og enskum

**LØN OG SETANARVIÐURSKIFTI**

eru í samsvari við galdandi sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**UMSÓKN**

saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving skal sendast til Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi 7. juni 2010. Merkið umsóknina „Byggifrøðingur til býarskipanardeildina".

**VILT TÚ VITA MEIRA**

ert tú vælkomin at seta teg í samband við Mikael H. Viderø, býararkitekt, ella Jákup Egholm Hansen, tekniskan stjóra, á telefon 30 20 10.

**Onnur størv í Tórshavnar Kommuna – Lesið meira á www.torshavn.fo**

**Pedagogur** – Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt
Umsóknarfreist 07.06.2010

**Pedagogur** – Dagstovnin Flatnagarð
Umsóknarfreist 07.06.2010

**Pedagogar** – Býlingshúsið undir Fjalli
Umsóknarfreist 07.06.2010

**Pedagogur og hjálparfólk** – Dagstovnin Sólareygað
Umsóknarfreist 14.06.2010

**Pedagogar** – Dagstovnin í Øksnagerði
Umsóknarfreist 07.06.2010

**Pedagogur** – Vøggustovan Reiðrið
Umsóknarfreist 07.06.2010

**Pedagogur** – Frítíðarskúlan Smílibýlið
Umsóknarfreist 14.06.2010

**Løn og setanarviðurskifti** fyri pedagogstørv eru í samsvari við galdandi sáttmála millum Pedagogfelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER LANDSINS STØRSTA KOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja sera stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava eina nútímans og opnan leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta vit somuleiðis innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA





Kopargøta 1
P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tlf. +298 31 11 11
Fax +298 35 11 10
www.liv.fo

LÍV søkir eftir

# samskipara til Pf. Lutaíbúðarvirkið

Til nýstovnaða luta- og leiguíbúðarfelag okkara søkja vit eftir framsøknum samskipara at seta skjótast gjørligt.

**Um starvið**

Pf. Lutaíbúðarvirkið er dótturfelag hjá LÍV og hevur sum endamál at byggja og reka luta- og leiguíbúðir í Føroyum. Sum samskipari fært tú ábyrgdina av uppstartinum av felagnum, har tú í samskifti og samstarvi við almennar myndugleikar fert at geva felagnum best hugsandi byrjan.

Starvið er tíðaravmarkað til 31. des. 2011.

**Um teg**

Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving og royndir. Umsøkjarar, sum hava arbeitt við líknandi verkætlanum áður, hava fyrimun. Tú hevur harumframt eitt sjálvstøðugt arbeiðslag, ert íðin og dugir væl at samstarva. Tú hevur eisini góðar førleikar at orða teg í skrift og talu.

**Umsóknir og umsóknarfreist**

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og øðrum skjølum skulu sendast til:

LÍV
Starvsfólkadeildin
Kopargøta 1
Postsmoga 206
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 26. mai.

**Meira at vita?**

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Atla Rasmussen á telefon 231 112 ella á atli@liv.fo.

LÍV er størsti veitari av lívs- og eftirlønartryggingum til fakfeløg og virkir.

SENDISTOVAN